## Katrin um politikk

– Eg eri rættiliga hopileys, tá tað kemur til politikk. Eg eri sjáldan á val niðri, tí eg haldi tað vera ábyrgdarleyst bara at velja onkran. Men eg veit tó hvør løgmaður er og hvør forsætisráðharrin er. Og so veit eg eisini, at danski mentamálaráðharrin eitur Brian Mikkelsen, tí hann plagar at ynskja okkum tillukku.



## … um heimlongsul

– Tað havi eg inn í millum. Ofta serliga um heystí, tá kappingarárið er av og gerandisdagurin broytist. Tað hendir seg eisini meiri enn so, at eg droymi meg heim og hugsi, at hvat hevði tað ikki verið stuttligt at gjørt tað og tað í Føroyum. Men mær dámar væl í Danmark.

# Læknalesandi World



**Tað byrjaði sum fjant og fjas, tá hon gekk á studentaskúlanum í Hoydølum, men tað endaði við World Cup-sigri, bronsu í heimsmeistarakappingini og luttøku á Olympisku leikunum. Katrin Olsen lesur medisin í Danmark og klárar kortini at venja ellivu ferðir um vikuna**

## Ítróttarprofilurin



**Rólant Waag Dam**
blaðmaður
rolant@sosialurin.fo

Í oysregninum kemur hon súkklandi inn á Skt. Hans Torv í danska høvuðsstaðnum. Heystið er so smátt byrjað at gera um seg, men Katrin Olsen hevur latið seg í eftir veðrinum. Regnklæði, gummistúvlar, hettu á høvdið og ein hjálm útyvir.

Har er ikki so nógv roks. Ófantaliga veðrið loyvir heldur ikki nógvum roksi, og tí gera vit av at seta okkum inn á nærmastu kaffistovuna at práta um tað, vit avtalaðu kvøldið fyri umvegis telefonina: privatpersónin Katrin Olsen. Katrin játtar og sigur samstundis, at tað illa ber til at tosa um hana, uttan at tosa um róving, tá róvingin fyllir so nógv í hennara gerandisdegi.

### Byrjaði í spølni

Hóast róvingin í dag fer við nógvari tíð og orku, so var tað ikki fyrr enn í øðrum flokki í Studentaskúlanum í Hoydølum, at Katrin byrjaði at róva.

– Vit vóru nakrar gentur, sum hildu tað vera stuttligt, um vit fóru at róva, og tað gjørdu vit so, greiðir Katrin frá. Hóast nógv fjant og fjas ivaðist hon ikki, tá hon sat við árini í hondini.

– Longu eftir fyrsta takið dámdi mær tað, sigur hon smílandi. Seinni sama ár løgdu nakrir eldri róvarar teimum lag á. Tá kom meira álvari í; tað gjørdist seriøst og síðani hevur tað at kalla bara gingið ein veg hjá Katrini: frameftir.

Fyrstu ferð Katrin stóð ovast á heiðursmerkjaskamlinum var í 1997.

– Tað vóru so nógvir faktorar, sum spældu inn, men í síðsta enda riggaði alt. Tað var heilt, heilt fantastiskt, og vit vóru sansaleyst svakar í gleði.

Tvey ár seinni gjørdist hon aftur føroyameistari, tá hon var við at vinna allar róðrarnar við Jarnbardi.

### Ørskapur í føroyskari róving

Hesi og nógv onnur góð minni hevur Katrin í føroyskum kapp-róðri, sum sambært henni er nakað serstakt.

Sosialurin